Átaluvert av løgmanni

Formaðurin í Føroya Væl, Jóan Petur Johannesen, sigur tað vera átaluvert, at løgmaður úttalar seg soleiðis í løgmansrøðu síni, uttan at hava viðgjørt málið við baklandið

Leo Poulsen

Eg eri staddur uttanlands og skal gera vart við, at nevndin í Føroya Væl ikki hevur viðgjørt málið, og tí úttali eg meg sum privatpersónur og ikki sum formaður í Føroya Væl. Men tað var ógvuliga óumhugsað at úttala seg í einum so grundleggjandi máli fyri Sambandsflokkin sum ríkissambandið er, sigur Jóan Petur Johannesen.

Hann heldur, at tað er ógvuliga óheppi av løgmanni at úttala seg um ríkisfelagsskapin, uttan at tað á nakran hátt er viðfgjørt í flokkinum.

Slík grundleggjandi mál fyri Sambandsflokkin mugu og skulu umrøðast, áðrenn alment verður meldað út um ein broyttan ríkisfelagsskap. Tað minsta átti at verið, at løgmaður tosaði við tingmanningina um hetta áðrenn, sigur Jóan Petur Johannesen.

Hann er sum nevnt staddur uttanlands, og málið verður tí ikki tikið upp, fyrr enn nevndin aftur verður fullmannað.

Men soleiðis sum eg síggi málið, eigur løgmaður at fáa eina átalu fyri slík úttalisli. Tí tað er klárt, at tað skapar ótryggleika millum sambandsfólk, sigur Jóan Petur Johannesen.

Hann vil tó ikki fara so vítt sum Edmund Joensen og krevja Kaj Leo Johannesen at leggja frá sær sum formann í flokkinum.

- Tað sigur seg sjálvt, at skuldu flokkarnir skift formann hvørja ferð eitt óheppi úttalisli kom, so gjørdu vit einki annað, sigur Jóan Petur Johannesen, formaður í Føroya Væl.

Formaðurin í Føroya Væl, Jóan Petur Johannesen, heldur tað vera ógvuliga óumhugsað av løgmanni at úttala seg um broytingar í ríkisfelagsskapinum uttan at hava baklandið við

Stak friðarligt á Summar Festivalinum

Vikuskiftið hevur verið stak friðarligt, og einki er at tosa um á Summar Festivalinum í Klaksvík. Tað hava sjálvandi verið nógvar uppringingar, men tað hevur sum nevnt verið ógvuliga friðarligt, sigur vakthavandi á politistøðini. Leygardagin var ein maður tikin á Sumkmar Festivalinum við einari rúgvu av rúsevnum uppi á sær, og hann varð í grundlógaravhoyri varðhaldsfongslaður í fýra vikur. Annars kannaði politiið eitt møguligt spiritusmál í morgun, men annars er einki at skriva heim um, sum vakthavandi málbar seg.

Í MORGIN

10/13 °C



Fleyr til gul av norði og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið

MIKUDAGIN

11/14 °C

Gul til stívt andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.

HÓSDAGIN

12/15 °C



Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.

Veðrið fríggjadagin og leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 16 stig, men har mjørki legst, um 10 stig.

LUFTTRÝSTIÐ



Síðstu nátt:
Eitt hátrýst, 1014 hPa. yvir Íslandi fer spakuliga suðureftir og mennist.



Komandi nátt:
Hátrýstið sunnan fyri Ísland mennist nakað.

HITALAG



Normal 1961-1990: 10,5°C

AVFALL



Miðal 1961-1990: 83 mm

VESTFALLSKYRRINDI

2/8: Fullmáni
9/8: Seinna kvarter
10/8: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2012

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
6. aug.	10:33	22:54	09:33	21:54	09:48	22:09	00:11	12:33	01:11	13:33	08:48	21:09	07:48	20:09	10:48	23:09	11:48	-	10:18	22:39	11:33	23:54
7. aug.	11:15	23:36	10:15	22:36	10:30	22:51	00:54	13:15	01:54	14:15	09:30	21:51	08:30	20:51	11:30	23:51	00:09	12:30	11:00	23:21	-	12:15
8. aug.	11:58	-	10:58	23:34	11:13	23:49	01:36	13:58	02:36	14:58	10:13	22:49	09:13	21:49	-	12:13	00:51	13:13	11:43	-	00:36	12:58
9. aug.	00:34	13:09	-	12:09	-	12:24	02:34	15:09	03:34	16:09	11:24	-	10:24	23:00	00:49	13:24	01:49	14:24	00:19	12:54	01:34	14:09
10. aug.	01:45	14:21	00:45	13:21	01:00	13:36	03:45	16:21	04:45	17:21	00:00	12:36	11:36	23:57	02:00	14:36	03:00	15:36	01:30	14:06	02:45	15:21